Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Staðseting av Veðurstovu Føroya

Spurningar:

1. Hvørji atlit eru tikin, tá ið avgjørt er at staðseta Veðurstovu Føroya í Tórshavn?
2. Er nøkur ætlan um at flyta veðurstovuna ella partar av henni út um landið - um ja, hvagar og nær?
3. Hevur samgongan eina ætlan viðvíkjandi miðspjaðing av almennum stovnum?

Viðmerkingar:
Veðurtænastan varð yvirtikin í 2009, men higartil hevur eingin verulig veðurstova verið í Føroyum. Í fjør játtaði Løgtingið 3,2 milliónir krónur afturat til at seta á stovn føroyska veðurstovu.
Í tíðindaskrivi 26. mars skrivar Vørn, at Veðurstovan í fyrstu atløgu fer at húsast við Hoyvíksvegin í Havn.[1] Tað er eingin loyna, at arbeitt verður innan veðurfrøði bæði á flogvøllinum og í Norðoyggjum, og partvíst eru hølir og útgerð tøk har.

Í hesum sambandi vil undirritaða hava at vita, hvørji atlit eru tikin til staðsetingina av veðurstovuni, og um hetta ikki er eitt starvsøki, ið við fyrimuni kann staðsetast allastaðni í landinum. Sagt verður í tíðindaskrivinum, at staðsetingin er fyribils, men kortini verður ikki sagt, hvussu leingi veðurstovan skal húsast í Havn. Royndir vísa okkum, at fyribilsloysnir ofta hava lyndi at gerast varandi.

Harumframt vil undirritaða hava greiðu á, hvørja støðu samgongan hevur til miðspjaðing av almennum størvum.

Á Løgtingi, 13. apríl 2021

Eyðgunn Samuelsen

[1] https://www.vorn.fo/kunning/tidindi/vedurstova-foroya-veruleiki/?fbclid=IwAR2t7sd0Mu5ovwoCFX2-r9eGY6ms9lKON7ioZSoxDrj2ZO89s889I2FPEJk